# Kollafjord Pelagic verður royndarkoyrt



*Maskinurnar eru nú aftur farnar at koyra á Kollafjord Pelagic eftir endurreisingina og nútímansgerðina. Nótaskipið, Ruth, er fyrsta skipið, sum landar til virkið undir nýggju eigarunum*

*Mynd: Jonhard Hammer*

**Á Kollafjord Pelagic eru tey farin at royndarkoyra nýggja frystiútbúnaðin, sum settur er upp á virkinum. Ruth er fyrsti báturin, sum landar til virkið eftir endurreisingina**

KOLLAFJØRÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Enn hevur Kollafjord Pelagic ikki alment boðað frá, at virkið tekur ímóti fiski til innfrystingar, men stjórin, Sofus Poulsen, vónar, at royndarkoyringin, sum nú fer fram, verður so mikið positiv, at tann dagurin ikki liggur langt frammi.

### 500 tons av sild

Fyrsta skipið, sum landar til Kollafjord Pelagic nú eftir endurreisingina og nútímansgerðina, er nótabáturin, Ruth hjá Gulaki Madsen í Hirtshals.

Sofus Poulsen sigur, at teir byrjaðu at landa Ruth hósmorgunin, og helst gongur allur dagurin í dag, áðrenn tey 500 tonsini av sild, sum skipið hevði inni, eru komin upp úr skipinum.

- Hetta er sum nevnt ein "test", nú eftir at nýggj frystiútgerð er sett upp á virkinum.

Stjórin vísir á, at fyrr enn hendan royndin er liðug, er ógjørligt at siga, hvussu nýggi útbúnaðurin virkar í verki.

- Men vit vóna, at alt gongur væl, soleiðis at virkið kann fara undir veruliga móttøku og innfrysting skjótast tilber.

Sofus sigur, at sildin, sum Ruth landar, er lutfalsliga smá. Hon verður skild í tvær støddir, pakkað í 20 kilo eskjur og heilfryst.

- Á virkinum kunnu vit skilja í fýra støddir, men tá ið fiskurin er smáur, verður hann, sum í hesum førinum, skildur í tvær støddir.

### Arbeiða í vaktum

Átta fólk eru burtur av knýtt at Kollafjord Pelagic, men tá ið fiskur er, verða eini 17-18 fólk til arbeiðis á hvørji vaktini umframt tey átta í føstum starvi

Sofus sigur, at arbeitt verður uttan steðg, til veiðan, sum skipini koma við, er fingin til høldar.

- Nú vit gera hesa royndina, hava vit biðið nøkur fólk komið til arbeiðis. Enn duga vit ikki at siga, hvussu tað verður at fáa fólk til tað arbeiði, sum væntandi verður á virkinum, tá ið gongd er komin á.

Stjórin vísir á, at arbeiði á Kollafjord Pelagic verður eftir, hvussu skipini koma inn at landa.

- Vit kunnu ikki rokna við, at arbeitt verður hvønn dag á virkinum, og hetta noyðast tey, sum verða í starvi hjá okkum, at laga seg eftir, sigur stjórin, Sofus Poulsen, sum annars hevur verið stjóri á Rækju- og skeljavirkinum á Oyri í fleiri ár.



NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK MARS 2004**

**SKRÁIN VIKA 10–11**

**Leygardagur 6. mars**
**Kl. 15.00 Framsýning (FO)** Størri grafisk verk hjá listakvinnuni Aase Bømler letur upp í Klingruni.

**Kl. 15.30 Framsýning (SE)** hjá listamanninum Lennart Iverus letur upp í Dansistovuni við tekningum og málningalist.

**Mánadagur 8. mars**
**Kl. 19.30 Aðalroynd** "Sangleikurin "Josef og ótrúliga dreymakotið". Framførsla fyri næmingum og foreldrum.

**Týsdagur 9. mars**
**Kl. 19.30 Frumsýning: Sangleikurin "Josef og ótrúliga litfagra dreymakotið".** Sangleikurin hjá Andrew Lloyd Webber er skrivaður yvir søguna í gamla testamenti um Jósef. Fyriskiparar eru Tónaungdómur (Føroya Studentaskúli og HF Skeið) og Norðurlandahúsið. Atgongumerki á kr. 150.- eru at fáa í NLH og Kunningarstovuni í Havn

**Mikudagur 10. mars**
**Kl. 20.00 KLIPP** Filmsfelag Norðurlandahúsins sýnir filmin "Lilja 4-Ever" leikstjóri Lukas Moodysson, Svøriki 2002(109min) (SE)
Atgongumerki á 60.- kr. eru at fáa í húsinum

**Hósdagur 11. mars**
**Kl. 19.30 Sangleikurin "Josef og ótrúliga dreymakotið. Kostn. Kr. 150.-**

**Fríggjadagur 12. mars**
**Kl. 19.30 Sangleikurin "Josef og ótrúliga dreymakotið. Kostn. Kr. 150.-**

**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-17.00 og sunnudagar kl. 14.00-17.00**

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo**






# ES verjir um sítt »kongaríki«

**Noreg hevur harðar kostir uttanfyri ES, tí avtalan við felagsskapin leggur ikki upp til meirvirking av fiskavørum í Noregi. Avtalan leggur hinvegin upp til útflutning av óvirkaðum fiski fiski og hálvlidnum fiskavørum**

NOREG
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Avtalan, sum Noreg hevur við ES, avmarkar møguleikarnar hjá norsku framleiðsluvinnuni at selja sínar virkaðu fiskavørur til ES. At kostnaðarstøðið í Noregi eisini er høgt, er búldur omaná sár. Tí er ikki óhugsandi, at vinnan fram við norsku strondini verður noydd at "flagga út" til lond við lægri framleiðslukostnaði. Avtalan við ES avmarkar snøgt sagt, hvat kann framleiðast í Noregi.

Á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum er greinastubbi um hesi viðurskifti.

### Økjast við góðsking

- Tolltakstirnir verja vinnuna í ES móti norskari kapping, sigur næstformaðurin í tí, sum norðmenn kalla, "Kysten inn i EU", Amund Ringdal.

Hann vísir á, at tolltakstirnir økjast við øktari góðsking.

- Okkara framleiðarar sleppa við lágum tolli, um fiskurin verður sendur óviðgjørdur ella minni viðgjørdur til ídnaðarlondini í ES. Hinvegin er tollurin væl hægri, um norskir framleiðarar velja at kappast við framleiðararnar í ES við lidnum vørum.

Ringdal tekur toskin sum dømi.

- Heilur fiskur ella flak geva ongar trupulleikar. Men ynskir framleiðarin at gera lidnar vørur, eitt nú saltfisk við tomatum, olju og leyki, gerst tollurin so høgur, at ikki ber til at kappast. Sama er galdandi fyri flestu vørur úr havinum.

Aftrat saltfiskinum nevnir Ringdal hvítleyksmarineraðar skeljar, royktan laks og sild til viðskera.

- Allar hesar vørur hava høgan toll í ES.

### Ídnaðurin hvørvur

Hann vísir á, at er fiskurin heilur ella bert skorin til flak, er lítil og eingin tollur. Tí hava norsk virkir lagt seg eftir at framleiða hálvvirkaðar vørur og ikki lidnar vørur.

Norsk virkir kappast annars við láglønarlond um framleiðslu av einfaldum fiskavørum í staðin fyri at leggja seg eftir vørum, sum krevja meira vitan og sum áttu at kastað meira av sær.

- Hetta kann koma at merkja, at fiskiídnaðurin fram við norsku strondini hvørvur, heldur Amund Ringdal.

Seinnu árini hevur Noreg miðvíst økt um útflutningin til Eysturevropu, men nú fleiri av hesum londum fara inn í ES, gerast trupulleikarnir á nýggju marknaðunum teir somu.

### Triðjalandsfiskur

Á heimasíðuni veit Vinnuhúsið at siga, at samstundis, sum norska vinnan gremur seg um vánaligar karmar uttanfyri ES, fegnast danski fiskiídnaðurin um, at tað nú verður lættari at innflyta rávøru úr triðjalondum.

Danmark útflytir árliga fyri 18 miljardir krónur av virkaðum fiskavørum.

- Danski ídnaðurin óttast fylgjurnar av stóra niðurskurðinum í kvotunum í Norðsjónum. Men nú hava ES-londini gjørt semju um at gera tað lættari at innflyta rávøru úr triðjalondum uttan tollavmarkingar, skrivar Vinnuhúsið.



## Borgarafundur í Nólsoy

NÓLSOY
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagin 13. mars verður borgarafundur í Nólsoy um ætlaðu samanleggingina við Tórshavnar kommunu. Eina viku seinni verður vegleiðandi fólkaatkvøða, og tá fæst at vita, hvat nólsoyingar halda um einmæltu samtyktina hjá bygdarráðnum í Nólsoy um at leggja saman við høvuðsstaðarkommununi.

Bygdarráðið sigur, at aðaltankin aftanfyri samanleggingina er: 1) at gera kommunurnar betur førar fyri at veita borgarunum betri tænastur í einum nútíðarsamfelag, 2) við samskipan at effektivisera og rationalisera planleggingina og raksturin av kommununum, 3) at fáa størri nyttu úr íløgum, ið longu eru gjørdar ella eru í gerð og harvið forða fyri skeivum "dupultum" íløgum, 4) at kommunurnar standa sterkari í kapping við útlandið um arbeiðspláss, og at allir borgarar, hvar teir so enn búgva í sameindu kommununi, skulu hava somu skyldur og somu rætt-indi.

Avgerðin liggur í hondunum á bygdarfólkinum í Nólsoy, ið sum nevnt verða kunnaði um ætlaðu samanleggingina á fundi í komandi viku.

# Tey fara at »syngja við« á Oyrarbakka



*Limir í Sundakórinum, sum bert hevur eitt ár á baki, taka nú stig til eitt "Syngið við" kvøld í Eydnuni á Oyrarbakka. Í Sundalagnum er eisini ein nýggjur tónleikabólkur, Í-Cast, sum framførdi sang og tónleik í Eydnuni á Oyrarbakka mánakvøldið*

**Tað eru limir í Sundakórinum, sum hava tikið stig til tiltakið í Eydnuni á Oyrarbakka**

TILTAK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

20. mars skipa fólk í Sundalagnum fyri einum "Syngið við" tiltaki í Eydnuni á Oyrarbakka.

Connie Joensen, fyrrverandi formaður í Ungmannafelagnum Eydnuni, sigur, at hetta verður eitt líknandi tiltak sum tey, vit kenna frá SvF-sendingunum nýggjársaftan.

### Stórt tiltak

- Ungmannafelagið hevur einar 150-200 limir, og hesir kunnu bjóða tilsamans 5 vinum og kenningum við til tiltakið, sigur hon.

Sum skilst, ætla sundalagsfólk rættiliga at hugna sær hetta kvøldið.

Tað eru nøkur fólk í Sundakórinum, sum hava tikið stig til kvøldið.

### Sundakórið

Sundakórið, sum bert hevur eitt ár á baki, telir einar 30 limir, og sum skilst, er áhugin fyri kórinum stórur í Sundalagnum.

Kórleiðari er Hans Olivur Joensen, sum annars er tónleikalærari í Havn.

Sundakórið er mannað bæði við kvinnum og monnum, ungum sum tilkomnum.

